# Skatta- og avgjaldsmál avgerðir

| Mál nr.: 09-03-31-66 | Lóg: Lóg um Toll- og Skattafyrisiting § 24 | Avgerð tikin: 07.09.2009 |
|---|---|---|

## Frávik frá kærufreist ikki loyvt


**Samandráttur:**

Kært er um, at TAKS hevur noktað frádrátti fyri mvg av bili. Avgerðin hjá TAKS er dagfest 30. apríl 2009. Kæran er dagfest 17. juni 2009 og var Kærustovninum í hendi tann 23. juni 2009. Hetta er aftaná, at kærufreistin er farin. Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur avgjørt at nokta at gera frávik frá kærufreistini, tí umstøður eru ikki í málinum, sum geva grundarlag fyri at víkja frá kærufreistini.


### Avgerð

**Kært er um,** at TAKS hevur noktað frádrátti fyri mvg av bili.

Avgerðin hjá TAKS er dagfest 30. apríl 2009. Kæran er dagfest 17. juni 2009 og var Kærustovninum í hendi tann 23. juni 2009. Hetta er aftaná, at kærufreistin er farin.

**Kærarin** upplýsir í telduposti frá 9. juli 2009 sum grundgeving fyri, at kæran er latin inn ov seint, at kærarin heitti á bókhaldaran um at hjálpa við kæruni. Bókhaldarin var tíverri ikki heima ta tíðina, og av tí at hann hevði nógv at gera við at fáa allar roknskapir lidnar til tíðina, bleiv bræv kærarans seinkað.

### Avgerð frá Skatta- og avgjaldskærunevndini

Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur tikið støðu til, um frávik skal gerast frá kærufreistini sambært § 24, stk. 3 í løgtingslóg nr. 169 frá 30. desember 1997 um Toll- og skattafyrisiting.

Sambært § 24, stk. 2, síðsta pkt. í lóg um Toll- og skattafyrisiting, skal kæra vera send, áðrenn 4 vikur eru lidnar frá tí, at kærandi fekk boð um avgerðina. Heimild er tó til at gera frávik frá kærufreistini, um nevndin heldur fullgóð forføll vera, jbr. § 24, stk. 3.

Avgerðin hjá TAKS er dagfest 30. apríl 2009 og má roknast at verða móttikin í seinasta lagi tann 4. mai 2009. Fýra vikur frá hesum degi er tann 1. juni 2009. Kæran skal verða send, áðrenn hesin dagur er liðin fyri at vera rættstundis.

Kæran er dagfest 17. juni 2009 og var Kærustovninum í hendi tann 23. juni 2009. Hetta er aftaná, at kærufreistin er farin. Útgangsstøðið er tí, at kæran verður ikki tikin til viðgerðar.

Sum nevnt kann frávik verða givið, um nevndin metir fullgóð forføll vera.

Sum áður nevnt skal kæran vera send, áðrenn 4 vikur eru lidnar frá tí, at kærandi fekk boð um avgerðina. Í kæruvegleiðingini hjá TAKS verður upplýst, at kæran skal vera móttikin, áðrenn 4 vikur eru lidnar frá tí, at kærandi fekk boð um avgerðina. Hetta kann tó ikki metast at hava týdning fyri, at kæran er latin inn ov seint í mun til freistina, sum er ásett í § 24, stk. 2, síðsta

punkt í lógini um toll- og skattafyrisiting og kann tí ikki geva grundarlag fyri at gera frávik frá freistini.

Sum grundgeving fyri, at kæran er latin inn ov seint, upplýsir kærarin, at bókhaldarin í fyrstu atløgu ikki var at hitta, og at bræv kærarans síðani bleiv seinkað, tí bókhaldarin hevði nógv at gera. Hetta eru ikki umstøður, sum kunnu geva grundarlag fyri at víkja frá freistini.

**Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur avgjørt at nokta at gera frávik frá kærufreistini, tí umstøður eru ikki í málinum, sum geva grundarlag fyri at víkja frá kærufreistini.**